## Kalsoyingar eftirmeta

Fólk í norðaru helvt av Kalsoynni eru ikki serliga fegin um, at Klaksvíkar kommuna, sum eisini er teirra kommuna, ætlar at byggja eldrabýli saman saman við kommununum á Viðareiði og í Svínoy. Eyðun Eliasen, sum er í staðbundnu nevndini fyri Trøllanes, sigur við Norðlýsið, at tað hevði verið eitt rættiligt frambrot fyri tær báðar norðastu bygdirnar í Kalsoynni, varð slíkur stovnur bygdur har. Samanleggingin má eftirmetast, sigur hann.

## Meiri varandi orku

Vit skulu brúka meiri av varandi orku í framtíðini. Tað heldur ein arbeiðsbólkur hjá Jarðfeingi og vinnumálaráðnum. Bólkurin heldur, at tað loysir seg betur at leggja dent á vindorku heldur enn vatnorku, og harafturat eiga vit at gera meiri burtur úr fjarhita, sigur bólkurin. Sambært stjóranum í Jarðfeingi, Sigurði í Jákupsstovu, eru góðir møguleikar fyri, at í 2015 fáa vit 20 prosent av orkuni frá varandi orkukeldum, um vilji er til tess.

## Hetta er heimsins minsta land – kostnaður 5,6 milliardir

**Sealand eitur »landið«, sum er 550 fermetrar til støddar og stendur á tveimum betongsúlum í Norðsjónum**

SØLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

The Times sigur, at eigararnir av Sealand ynskja at selja »landið«, sum virkaði sum sjóskansi undir øðrum Veraldarbardaga.

Sealand liggur 11 kilometrar uttan fyri enska havnabýin Harwich, og hevur egið flagg, tjóðsang, pengastøði og landslið í fótbólti.

Tað var í 1967 at fyrrverandi majorurin, Paddy Roy Bates, festi búgv á platforminum. Beinanvegin skýrdi Paddy Roy Bates platformin at vera eitt land, og krýndi seg sjálvan sum prins.

Í 1968 royndi enski flotin fáa "Prins Bates" av platforminum, men hann svaraði aftur og skeyt eftir flotanum. Seinni gav ein bretskur dómari Bates viðhald í, at Sealand lá uttanfyri bretskt farvatn, og soleiðis kundi Bates nøkur ár seinni leggja eina stjórnarskipan fram, galdandi fyri Sealand.

Í 1978 rændu nakrir týskir og hálendskir handilsmenn sonin hjá Prins Bates. Men Prins Bates svaraði aftur við luftálopum, bjargaði soninum og tók rænararnar til krígsfangar. Seinni vórðu teir tó leyslatnir aftur.

Við til søguna hoyrir, at Sealand ikki er viðurkent sum land av nøkrum øðrum landi. Nú er tað altso til sølu fyri 5,6 milliardir, sigur The Times. Fleiri upplýsingar um Sealand eru at finna á heimasíðuni hjá landinum, www.sealandgov.org.



# Skammlop orsøk til eldin

**Eitt skammlop í eini el-innlegging er orsøkin til stóra eldin á Trongisvági fríggjakvøldið, tá gamla statoilstøðin brann í grund. Tað niðurstøðan eftir kanningar hjá løgregluni**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Trongisvágur:** Løgreglan hevur verið í Suðuroy og gjørt kanningar av tí, sum eftir er eftir stóra eldin í gomlu statoilstøðini á Trongisvági í Suðuroy fríggjakvøldið.

– Vit hava verið í Suðuroy og hugt upp á tað. Út frá teimum fyrstu kanningunum kunnu vit staðfesta, at eldurin byrjaði í gomlu vaskihøllini, og at orsøkin helst er eitt skammlop í eini elinnlegging, sigur Per Skov frá løgregluni í Havn.

– Merkir frá einum skammlopi eru at síggja á leiðningum á vegginum í vaskihøllini, sigur Per Skov og leggur so aftrat, at brandmyndin vísir greitt, at tað var í vaskihøllini at eldurin byrjaði, og at hann hevur breitt seg hagani.



*Soleiðis sær tað út inni í stóru høllini, har millum annað stóri oljubilurin stóð, men sum var fingin út í evstu løtu*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Sent leiðningar til Danmarkar

Løgreglan í Føroyum hevur menn, sum hava útbúgvið seg serliga innanfyri eld, og teirra millum er Per Skov. Hann var sjálvur í Suðuroy og gjørdi kanningarnar, og við sær aftur tók hann nakrar leiðningar, sum nú eru sendir til Danmarkar til nærri kanningar.

– Hetta verður gjørt fyri at staðfesta og undirbyggja okkara niðurstøðu, greiðir Per Skov, løgreglumaður, frá.

# Leif Mohr keypt Eyðun Jespersen

**Ein stór elektrikara fyritøka hevur keypt eina minni elektrikara fyritøku. Tað er veruleikin nú P/f Leif Mohr hevur keypt Eyðun Jespersen**

VINNA
*Rólant Waag Dam*

Tað sum er keypt, er felagið EJ Contractors. Tað er holdingfelagið í einum samtaki. EJ Contractors eigur partapeningin í feløgunum Eyðun Jespersen, Jes og Mainhard Haldansen. Eisini eigur EJ Contractors báðar bygningarnar, sum húsa virksemin hjá samtakinum.

Felagið Eyðun Jespersen hevur virksemið innan elmekanik, køli- og frystiarbeiði og el-arbeiði. Mainhard Haldansen arbeiðir við teknikk og mekanikki innan alibrúk og smoltstøðir. Onki virksemi er í Jes í løtuni.

### Hóska væl saman

– Talan er um eina sera vælrikna fyritøku, sum hevur virksemi, ið hóskar væl saman við verandi virksemi hjá LM. Keypið ger báðar fyritøkurnar sterkari, heldur enn um tær sum higartil vóru hvør fyri seg, sigur Leivur Holm, stjóri í Leif Mohr, tá vit spyrja hann um orsøkina til keypið, sum varð formaliserað 2. januar.

– Vit meta, at vit koma at standa sterkari á økjum, har vit fyrr ikki hava gjørt so nógv um okkum, og vit verða førir fyri at bjóða eitt breiðari úrval av vørum og tænastum, vísir Leivur Holm á.

Hann vil ikki siga nakað um keypsprís, tí partarnir hava avtalað sína millum, at hetta verður teirra millum.




*Leif Mohr hevur keypt Eyðun Jespersen, men tað fer ikki at merkja nakað í gerandisdegnum hjá teimum, tí Eyðun Jespersen heldur fram sum sjálvstøðugt felag*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

### Framvegis sjálvstøðugt felag

Fyri teir sum arbeiða hjá Eyðun Jespersen fer hetta ikki at merkja gerandisdagin. Teir arbeiða har fyrr sum enn, tí Eyðun Jespersen kemur at halda fram sum eitt sjálvstøðugt felag.

– So hvørt tíðin er búgvin, kunnu tillagingar millum LM og EJ koma uppá tal. Hetta alt fyri at gera felags drift so effektiva og dygdargóða sum møguligt, sigur Leivur Holm.

### Nýggjur stjóri

Onkur broyting verður tó skjótt. Rói Vang byrjar sum stjóri í Eyðun Jespersen frá 1. februar. Hann arbeiðir í løtuni í ráðgevingarfyritøkuni KJ Elráð, og hevur áðrenn hetta verið stjóri í JT Electric.

Eyðun Jespersen sjálvur hevur játtað at halda fram at arbeiða í felagnum sum verkførari, og tað fegnast Leivur Holm um.